TVØROYRAR KOMMUNA

# LÆRARASTØRV
## Í TVØROYRAR SKÚLA

**Hesi størv eru leys at søkja:**
- 4 tíðaravmarkað fulltíðarstørv skúlaárið 2007-08 vegna lærara í farloyvi og lækkað tímatal.
- 1 tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2007-08 vegna avlopstímar og serligan tørv.

**Lærarar, ið settir verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við samstarvsfelagarnar fremja frálæru og verða partur av skúlans dagliga arbeiði
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- vera fúsir til at átaka sær uppgávur, ið annars eru á skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Haraftrat skulu lærararnir hava førleika til at átaka sær allar vanligar lærugreinir, og umframt tað hevur skúlin tørv á lærarum, ið skulu átaka sær:**
- frálæru í týskum
- frálæru í ítrótti og svimjing
- frálæru í alis -og evnafrøði

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar -og setanartreytir:**
Størvini verða sett sum tíðaravmarkað sáttmálasett størv. Tímatalið til parttíðarstarvið verður ikki endaliga sett fyrr enn í september 2007.

Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar størvunum viðvíkjandi og koma at starvast við báðar skúlarnar í kommununi: Tvøroyrar skúla og Trongisvágs skúla.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjamálaráðið.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast 26. juni klokkan 12.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran á Tvøroyri tlf. 371582.

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir fólkið til høvuðsreingerð og fólkið til fastar reingerðaruppgávur, at byrja beinanvegin. Fólkið, ið sett verður, má duga at arbeiða sjálvstøðugt og verða røkin. Roknast kann við, at til tíðir kunnu skeivar tíðir koma fyri, so sum, kvøld og vikuskiftis reingerð.

Samstundis verðir søkt eftir frítíðaravloysarum til summarið 2007. Talan er fyri tað mesta um fastar uppgávur, dag og kvøld.

Vinarliga ringið ella sms'ið til Jóannes á 211312 millum 13 og 17, ella skrivið til reinger@post.olivant.fo, um áhugi er fyri einum av omanfyri nevnda.

**Vaskarí & Reingering**



# Porkeris skúli

Søkt verður eftir einum lærara til tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2007/2008.

Starvið er uml. 10 tímar vegna avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

Umsøkjarin skal m. a. kunna átaka sær undirvísing í:

- Køk
- Handaligu lærugreinunum
- Heimstaðarlæru
- Søgu
- Fimleiki

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og eru fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vera við til at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Søkt verður eisini eftir stuðulsfólki til skúlaárið 2007/2008 til næming við serligum tørvi.

Starvið er 15 tímar um vikuna.

Fyrimunir hava umsøkjarar við royndum og viðkomandi útbúgving.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, opin fyri samstarvi við bæði leiðslu, lærarar og foreldur.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum Mannbjørn Olsen, Hólavegur 15, Porkeri, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. juni 2007 kl. 12.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Mannbjørn Olsen, tlf. 373253 / 262864.



# VW T4 Multivan til sølu

Hevur tú tørv á meira plássi í bilinum,
nú tú skalt út at ferðast, so er hetta rætti bilurin.

VW T4 Multivan, 2,5 Tdi, árg. sep. 2001.
Koyrt 120.000 km

**Telefon 319848/219848**

# Skúlin á Trøðni

**Størv til komandi skúlaár**
**1 lærarastarv,** fast starv
**1 lærarastarv,** tíðarmarkað
til komandi skúlaár. Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Lærarafelag.

**1 pedagogstarv,** tíðarmarkað
til komandi skúlaár. Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

**1 starv sum hjálparfólk,** fast starv
Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

**Vit vænta tú hevur**
- Útbúgving/royndir
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt og við hugflogi eftir støði barnanna
- Verur við til at menna skúlan

Skúlin á Trøðni er serskúli, tekur sær av børnum við serligum tørvi.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 20. juni 2006.**

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til skúlastjóran, Jan Christiansen, tlf. 314522 ella 280025

**Skúlin á Trøðni**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – 165 Argir
Telefon 314522 – Fax 310196

# LÆRARI
## til Haraldssunds skúla

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir abyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærara skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- er fúsur at átaka sær tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Førleikakrøv:**
Haraldssunds skúli er einflokkaður, tí hava vit brúk fyri lærara, sum kann undirvísa í øllum lærugreinum í 1. – 7. fl.

Starvið fevnir um 9 avlopst/v til allar vanligar lærugreinar umframt 11 t/v til serligan tørv.

**Starvið verður lønt**
í lønarflokkum 18.1 – 27.4 sambart avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2007/08.

Umsókn við avriti av prógvi, cv og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2007.

**Send umsóknina til:**
Magnu Thomassen
785 Haraldssunds Skúli

**Meira fæst at vita um starvið frá:**
magna.thomassen@skulin.fo
tlf. 457336 skúlin
tlf. 455071 555071